Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo





*Dia á Ólastrovu, pápi Kristian Djurhuus*

leggja á Nólsoyarfjørð og at royna at sleppa inn á Havnina. Skipið fór tískil beinleiðis til sjós og tók Christian við sær. Hann hevði ongantíð verið uttanlands og var ikki fegin um, at tað ikki bar til at geva boð til hansara húski um hesa uttanlandsferðina. Skipið skuldi fyrst til Skotlands, og hagar var hann noyddur at fylgja við. Tá komið var til Rothesay á Isle of Bute í útsynnings Skotlandi, fingu teir at vita, at fyrsta skip til Føroya skuldi fara nakrar dagar seinni.

## Slapp at síggja sporvogn fyrstu ferð

Dagin fyri, at farast skuldi, varð Christian sendur til Leith saman við einum yvirmanni, sum fekk boð um at syrgja fyri at fáa ferðamannin væl og virðiliga umborð á skipið til Føroya. Á ferðini frá Greenock yvir Edinburg til Leith fekk Christian høvi til at síggja nøkur av nútíðar uppfinnilsum, sum sporvognar, tok, háhús og nógv annað. Og tað sást eisini á andlitinum á honum, hvussu bilsin hann var.

Men mest hugtók tað Christian tó at síggja tann stóra skotska hestin. Í Føroyum kendi hann bert tann lítla føroyska hestin, sum ikki var stórt størri enn ein stórur danskur hundur.

Christian kom heim í øllum góðum og kundi greiða frá øllum, hann hevði upplivað.

Og hann fekk mangan høvi at minnast aftur á hesa hending umborð á "Dagmar", tá skipið seinni kom á Havnina, og hann kom umborð sum "karantænebetjent", eitt starv sum hann hevði í nógv ár.

## Varð "loftaður" á floti

Henda søgan er kend í ættini, sum hevur hetta ískoytið:

Christian var sjálvur annar á floti við snøri, tá ið fregattin kom inn í Nólsoyarfjørð. Teir løgdu at bátinum, og kommandørurin ynskti loðs til Vestmanna. Christian fór sum hann stóð. Hin maðurin róði inn til Havnar og gav boð um, at Christian var farin til Vestmanna. Men tá ið teir komu inn í Vestmannasund, var so nógvur mjørki, at kommandørurin hættaði sær ikki víðari; men valdi at sigla til Glasgow í Skotlandi, har hann hevði onkra umráðandi avtalu. Loðsurin mátti fylgja við, uttan at tað bar til at geva boð frá sær.

Í Skotlandi var hann til hann slapp heim aftur við Lyru. Hann var enn í somu útróðrarklæðum. Tá høvdu tey heima verið bangin um hann.

Til minnis um ferðina fekk hann innrammaðu myndirnar av korvettini "Dagmar" og av sær sjálvum á dekkinum.

Eisini hevði Christian seinni javnan vitjan av yvirmonnum á "Dagmar." Kristian greiðir frá, at ein av hesum gestum, yvirmaðurin Broberg, gjørdist nærum heimsgitin, tá ið hann ein av fyrstu døgunum undir 1. heimsbardaga, bað donsku myndugleikarnar um loyvi til at skjóta eftir einum týskum herskipi, sum var komið inn um danskt sjómark við Saltholm í Oyrasundi.

Hann gjørdi hetta fyri at bjarga manningini á einum bretskum kavbáti, sum var strandaður har, og sum týskarar gjørdu seg inn á.

Broberg legði seg við sínum skipi ímillum, og bað um loyvi til at skjóta. Men hetta var noktað honum av hægri myndigleikum.

Kristian heldur, at um Broberg hevði fingið loyvi til at skjóta, hevði tað í hvussu er kunnað skapt virðing fyri Danmark fyri at vilja verja sítt sjóøki.

## Um Christian

Christian giftist sum nevnt inn í Ólastovu í Havn við Anne Marie Christine Danielsdatter.

Christian í Ólastovu lívbjargaði sær við útróðri og fyrifallandi arbeiði her í Havn. Men frá einaferð í 1860-unum fer hann at føra skipini hjá Skibstedhandlinum. Við jaktunum førir hann ymsar vørur út til úthandlarnir, og hann førir fisk og aðrar innkeyptar vørur aftur til Havnar. Hann var tí sera væl kendur við sigling millum oyggjarnar. Hann verður nevndur "Skibsfører" í fólkateljingunum frá 1870. Prógv sum "Sætteskipper" fekk hann í 1893, 59 ára gamal.

Hann ognaði sær fitt av jørð, traðir í Havn, umframt umleið tvær merkur í Vestmanna og Tjørnuvík, sum hann fekk við arvi.

Anna Maria var slektað av Válinum. Fólkið í teimum ymisku bygdunum kendu Christian væl og høvdu so stórt álit á honum, at tey lótu hann gera ymisk ørindi fyri seg. Til dømis lótu tey honum pengar at seta inn, og tey lótu honum sparikassabøkurnar í varðveitslu.

Tveir yngri brøður hansara Hans Andreas á Vertshúsinum og Jens Christian sigldu úti í verðini. Jens Christian búði í USA meginpartin av lívinum og kom sum gamal heim til Føroya, og her doyði hann. Tískil er hann jarðaður undir Svínaryggi.

## Hans Andrias fekk løgmann til son

Anna Maria og Kristian fingu bert ein son, sum var Hans Andrias Djurhuus, vanliga nevndur Dia í Ólastovu (1869-1949). Hann var giftist við Ellen Cathrine Larsen, (1869-1937), úr Gjørðum í Porkeri. Hans Andreas var avlærdur timburmaður og var ímillum teir, sum smíðaðu bakarahandilin hjá Frants Restorff og Sanatoriið í Hoydølum. Í fleiri ár var hann vitapassari á Skansanum og løgtingsmaður 1910-18. Eisini legði hann eins og faðirin traðir inn. Hann hevði so mikið av jørð, at tey høvdu tvær kýr í Ólastovu.



*Fyrsta landsstýrið 1948-1950. Standandi Kristian Djurhuus tv. Og Jóan Petur Davidsen. Sitandi Andrass Samuelsen og Louis Zachariassen*

## Skrínið av burturgingna bátinum bjargaði tjørnuvíkingum

Dia hevði ringa sjóeydnu. Tað komst av eini ferð, tá ið hann hevði verið í grind. Stór grind var deyð í Miðvági (540 hvalir) Ólavsøkudag 1895. Teir høvdu verið sjey mans har vesturi við einum áttamannafari og róðu nú aftur til Havnar við nítjan skinnum av grind umborð. Komnir út fyri Sveipini millum Kirkjubønes og Glyvursnes tók báturin sjógv inn og fór síðani runt. Tað eydnaðist teimum at koma upp á kjøl, og róku teir nú út við eystfallinum. Tað róðu fleiri bátar fram við uttan at bera eyga við teir, inntil ein hoyvíksbátur við millum øðrum Johan Simonsen sá teir og tók teir upp. Tá vóru teir bert tveir eftir, Dia og Niels á Bakka (Niels Debes). Teir, sum sjólótust, vóru Ludvig Thomsen, C. P. Ziska, Jacob Jacobsen (Jáku á Mýrini), Poul Johannes Poulsen (á Kletti) og Janus Hansen (á Bakka). Hendan hendingin tók Dia so fast, at hann neyvan fór í bát aftur.

Báturin og alt, sum var umborð á bátinum, bleiv burtur. Seks vikur seinni vóru tjørnuvíkingar á útróðri á Norðhavinum. Knappliga kom mjørki á teir. Stilli var, so teir høvdu einki at miða seg eftir, og teir gjørdu av at bíða, til tað lætti aftur. Meðan teir bíða, kemur okkurt rekandi fram við, og tað vísir seg at vera útróðrarskrínið hjá Dia við kumpassini í. Við henni kundu teir so rógva inn aftur. Kistan kom so aftur í Ólastovu og er til enn.

## Sonurin gjørdist løgmaður

Synir Hans Andreas vóru Kristian, føddur 1895, giftur við Onnu Margrethe Nielsen fødd 1893 í Heiðunum, Johan føddur 1897, sum doyði ógiftur 21 ára gamal og Johannes Martin (Martin í Ólastovu) føddur 1900, giftur við Edel Kristine Mortensen, fødd 1907 á Tvøroyri.

Kristian og Margretha giftust inn í Ólastovu. Tey fingu synirnar Johan Frits, seinni virdur skrivstovustjóri í landsstýrinum, Hans Andreas, sum virkaði í danska uttanríkisráðnum, Erling og Ejler.

Hugin til at dyrka úr nýggjum tók hann við til Suðuroyar, har hann legði stórar traðir inn.

Martin í Ólastovu, postmeistarin, hevði eisini stóran áhuga fyri traðarbrúkinum og var formaður í Traðarmannafelagnum í Havn í fleiri ár. Fyri Traðarmannafelagið sat hann í Jarðarráðnum. Hann legði sær stóra trøð inn úti í Vikanum í Havnardali.

Í 1963 varð Ólastova seld til Tryggingarsambandið Føroyar. Tryggingarsambandið lat Ólastovu til Føroya Fornminnisfelag, sum hevur umvælt bæði uttan og innan til prýðis fyri havnarlagið.



*Myndin av Dagmar, sum Christian fekk til minnis um ferðina*

Í komandi parti, sum verður um 14 dagar vegna jólini, kemur fyrsti partur av frásøgnini hjá Kristian og hjá Ejler